# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# FM í talvi fyri børn og ung

Spenningurin hevur ofta verið stórur, tá avgerandi dystirnir skulu telvast



**Talvsamband Føroya skipar aftur í vetur fyri Føroyameistarakapping fyri børn- og ung fyri einstaklingar í talvi. Kappingin verður skipað í 5 ymiskum aldursbólkum, og er samstundis úttøkukapping til NM-kappingina 2008**

TALV
*Tíðindaskriv*

Kappingin um FM-heitið verður í somu aldursbólkum sum til NM-kappingina:
**A - bólkur:** Telvarar føddir 1988-90 (17-20 ár)
**B - bólkur:** Telvarar føddir 1991-92 (15-16 ár)
**C - bólkur:** Telvarar føddir 1993-94 (13-14 ár)
**D - bólkur:** Telvarar føddir 1995-96 og (11-12 ár)
**E - bólkur:** Telvarar føddir 1997 og seinni. (10 ár og yngri)

Kappingin er opin fyri øllum áhugaðum talvungdómi. Skipað verður fyri 3 kappingum, har tvær tær fyrstu eru úttøkukappingar til endaligu finaluna:

**(1)** Fyrsta kappingin verður í Vestmanna 4. november 2007 (fyriskipari Vestmanna Talvfelag).

Telvað verða 8 umfør, har hvør telvari hevur 10. min. í part til hvørt talvið. Heiðursmerki verða latin til nr. 1, 2 og 3 í hvørjum aldursbólki. Byrjað verður kl. 14. Telvað verður í aulini í skúlanum. Seinasta freist at melda luttøku, er fríggjakvøldið 2. november 2007.

**(2)** Onnur kappingin verður í Sandavági 10. november 2007 (fyriskipari Sandavágs Talvfelag).

Telva verða 8 umfør, har hvør telvari hevur 10. min. til hvørt talvið. Heiðursmerki verða latin til nr. 1, 2 og 3 í hvørjum aldursbólki. Byrjað verður kl. 12. Telvað verður í SÍF-húsinum. Seinasta freist at melda luttøku, er hóskvøldið 8. november 2007.

**(3)** Triðja kappingin (finalan) verður 24. november 2007 í Tórshavn (fyriskipari TSF).

Telvað verða 7 umfør, har allir møta øllum. Hvør telvari hevur 30 min. í part til hvørt talvið. Í finaluni luttaka teir 8 telvararnir, sum í tveimum teimum fyrstu kappingunum hava staðið seg best. Telvað verður í skúlanum á Argjum. Byrjað verður kl. 10.

Í finaluni verður nr. 1 í hvørjum aldursbólki Føroyameistari, nr. 2 gerst nr. 2, o.s.fr. Steyp verða latin til nr. 1, 2 og 3 í finaluni.

Umframt føroyameistaraheitið, vinna tey bæði fremstu í hvørjum aldursbólki rætt at taka lut í NM-kappingina fyri einstaklingar, sum hesuferð verður í Danmark - í februar mánaði 2008.

Sí annars heimasíðu Talvsamband Føroya: www.faroechess.com.

## Manchester United-fjepparar møtast í Manhattan

Nú ætla Manchester United-viðhaldsfólk at taka stigið til at stovna eitt føroyskt fjepparafelag. Fyrsta stigið verður tikið leygarmorgun í Manhattan, í Havn.

Liverpool, Newcastle og Arsenal hava síni fjepparafeløg í Føroyum. Nú verður gjørt klárt til at stovna eitt føroyskt Manchester United-fjepparafelag. United-viðhaldsfólk fara at møtast í Manhattan, leygarmorgunin 3. november kl. 11. Klokkan 12 er dystur millum Arsenal og Manchester United á skránni. Men byrjað verður kl. 11. Ætlanin hjá fyriskiparunum er fyrst at lodda dýpið hjá United-fjepparunum, um hvussu fjepparafelagið eigur at skipa seg, og hvørji tiltøk ein eigur at leggja seg eftir at skipa fyri. Eyðsýnt er, at túrar til Old Trafford standa ovast á ynskilistanum hjá øllum United-fjepparunum. Eisini ætla stigtakararnir at venda tingum, sum viðurkenning frá Manchester United, heimasíðu, og hvussu arbeiðið skal skipast. Men givið er, at hetta arbeiðið krevur undirtøku frá United-viðhaldsfólkum í Føroyum. Kl. 12 fara United-viðhaldsfólkini at hyggja saman eftir toppdystinum millum Arsenal og Manchester United. Vinnur United dystin á Emirates Stadium, fáa tey, sum eru í einari United-troyggju, boðið okkurt leskiligt til góman. Talan verður tá um vørur frá Føroya Bjór. Tá føroyskir Arsenal-fjepparar stovnaðu sítt fjepparafelag, var fult hús á Manhattan!

**HS**

## Føroyar fingið OL-dómara

**Schandorff Vang hevur fingið víst tað stóra álit og heiður at vera OL-dómari 2008. Hetta varð veruleiki, tá tað á dómarakonferensuni hjá FITA, ið hildin varð í Rom í døgunum 26.-28. oktober, varð kunngjørt, hvørji skuldu døma í bogaskjótikappingunum á Olympisku leikunum 2008 í Beijing.**

**14 dómarar úr ymiskum londum eru valdir, harav bert tveir skandinavar. Dómararnir eru úr londunum NOR, CHN, AUS, SLO, LEB, USA, TUR, ITA, GER, SIN, HKG, VEN, CUB og FER (Føroyum).**

**Schandorff hevur verið altjóða dómari síðan 1996 og hevur dømt í nógvum altjóða kappingum, m.a. Paralympic 2000, HM, EM, World Master Games, evropeiskum Grand Prix og World Cup.**

**Bogaskjótideildin**

